gult22 cyan22 magenta22 svart22



**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Radiografur/-røntgensjúkrasystir

Á Røntgendeildini er eitt fulltíðarstarv sum radiografur ella røntgensjúkrasystir leyst at søkja til setan tann 1. september 2001.

Starvið er við tilkallivakt frá heimi kvøld/nátt og vikuskifti.

Á Røntgendeildini verða vanligar konventionellar kanningar gjørdar

- mammografi
- ct-skanningar
- ultraljóðkanningar
- mr-skanningar

**Krøv til umsøkjaran:**
- prógv og góðkenning sum radiografur/-røntgensjúkrasystir
- góð samstarvsevni
- royndir við MR-skannara er ein fyrimunur

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Ragnu Skylv Reinert, deildarsjúkrasystir, telefon 313540, lokal 149.

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Sjúkrasystrafelag Føroya/Radiografar í Føroyum og Fíggjarmálastýrið.

**Umsóknarfreistin er:** 3. august 2001, kl. 14.00.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

# Vaskifólk

Vaskarí & Reingering søkir eftir royndum dugnaligum fólki til reingerðaruppgávur í Tórshavn.

Vit hava brúk fyri tveimum fólkum til fastar vaktir (gjarna vinkonur) og trimum avloysarum til summarið 2001.

Væntast má at: Fólkið, ið brúkast skal, má vera álitandi og duga at arbeiða sjálvstøðugt og vera eldri enn 21 ár.

Er hetta nakað fyri teg, ring beinanvegin til Jóannes á tlf. 211312 ella Mary á 313224.

Vaskarí & Reingering

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Útbjóðing

**Tórshavnar kommuna bjóðar við hesum út arbeiðið at byggja 2 nýggjar dagstovnar, ið hvør skal vera til 36 barnagarðsbørn og 24 vøggustovubørn, at langtíðarleiga kommununi.**

Ætlanin snýr seg um, at arbeiðstakarar, í almennari listatión, kunnu lata inn tilboð uppá at leiga Tórshavnar kommunu 2 nýbygdar dagstovnar í upp til 15 ár. Tað vil siga, at arbeiðstakarin ella felag hansara skal byggja og eiga stovnarnar í upp til 15 ár.

Tilboðsgevarin skal í tilboðnum eisini áseta krónutal, ið Tórshavnar kommuna kann yvirtaka ognirnar fyri, tá ið 15 ára leigutíðarskeiðið er útrunnið. Verða dagstovnarnir (dagstovnurin) yvirtikin, innan 15 ár eru liðin, verður samráðst um yvirtøkuupphæddina.

Grundøkini verða ávíst av Tórshavnar kommunu.

**Arbeiðstakarin stendur fyri øllum pørtum í byggingini, herundir m.a.:**
- projektering
- útgrevstur, spreinging, planering
- lendisarbeiði
- betong- og kloakkarbeiði
- timbur- og snikkaraarbeiði
- el-arbeiði
- gólvleggingararbeiði
- múraraarbeiði
- HS-arbeiði og ventilatión
- málaraarbeiði

Leikur og leyst innbúgv skal ikki takast við í tilboðnum.

Útbjóðingartilfar fæst við at venda sær til:

**Snarskivuna**
**Vaglið**
**FO-100 Tórshavn**
**Tlf. 31 51 60**

Í seinast lagi 25. juni 2001.

Tilboðini skulu verða **Tórshavnar kommunu, postrúm 32, FO-110 Tórshavn**, í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. juli 2001 kl. 15.00, tá tey verða latin upp í býráðssalinum. Teir bjóðandi kunnu vera hjástaddir.

Tilboðini, ið skulu vera merkt **"Dagstovnur - Tilboð"**

SNARSKIVAN


Uppsetan og skipan av barrum

Til:
Brúdleyp
Rundar føðingardagar
Starvsfólkaveitslur
Ársveitslur
Reseptiónir
og tílíkt



Hans á Lag Sp/f
Tlf. 21 93 83
hanslag@post.olivant.fo

Sosialurin 311820


# Umlættingarfamilja Fosturfamilja

Barnaverndin hjá Klaksvíkar Kommunu søkir við hesum eftir familjum úr øllum Føroyum, ið hava hug og umstøður at gerast umlættingarfamilja ella fosturfamilja.

**Umlættingarfamilja:**
Er familja, ið átekur sær at hava barn/børn við ávísum tørvi búgvandi í t.d. vikuskiftum ella ávíst dagatal í senn, alt eftir hvat avtala verður. Uppgávan er at vera um barnið og geva tí tryggar umstøður. Talan kann eisini verða um uppgávur, har umlættingarfamiljan trakkar til, vegna ófullfíggja trygdarnet hjá biologisku familjuni.

**Fosturfamilja:**
Er familja, ið átekur sær at hava barn/børn við ávísum tørvi fastbúgvandi í styttri ella longri tíðarskeið, tí umstøðurnar hjá biologisku familjuni av ymiskum orsøkum kunnu hava ávirkan á vælferðina hjá barninum.

**Tit fáa:**
- spennandi og mennandi arbeiði, sum tíðum kann verða kravmikið
- tætt samstarv við fakfólk á sosialu deild
- supervisión
- samsýning

**Vit vænta:**
- at familjan er vælvirkandi
- at tit hava stundir til børn
- at tit hava gevandi samband við børn
- at tit eru samstarvshugað mótvegis biologisku familjuni, barnaverndini og øðrum samstarvspørtum
- at tit eru sinnaði at vera við í bólki av fosturfamiljum, sum hittast av og á

Áhugaðar familjur kunnu fáa nærri upplýsingar við at venda sær til Sigrun Vágstún á tlf. 456388.

Umsóknir skulu sendast til:

**Barnaverndarnevndin**
Klaksvíkar Kommuna
Postboks 2
700 Klaksvík

# Gluggaframsýning við Amariel Norðoy

Glarsmiðjan heldur eina lítla framsýning við umleið 25 innrammaðum myndum av Amariel Norðoy.

Bíløtini kunnu síggjast í framsýningarglugganum hjá Glarsmiðjuni.

Framsýningin varar frá mánadegnum tann 18. 06. til leygardagin tann 23. 06.

Opið er mánadag til fríggjadag kl. 10-17.30 og leygardag kl. 10-12.30.

Alt innan innramman.

**Glarsmiðjan**
Bøgøta 16 · 100 Tórshavn
Tlf. og Fax 310623

gult23 cyan23 magenta23 svart23



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Pedagogar

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir pedagogum til Býlingshúsið á Flat.

**Størvini**
Talan er um eitt pedagogstarv, 30 tímar um vikuna, í barnagarðsstovu og eitt pedagogstarv, 40 tímar um vikuna, á vøggustovu, ið er eitt farloyvisstarv.

**Stovnslýsing**
Býlingshúsið á Flat er normerað til 40 barnagarðsbørn og 12 vøggustovubørn.

Býlingshúsið liggur í einum sera náttúruríkum og avbjóðandi umhvørvi.

**Vit bjóða**
tvey áhugaverd størv, har umsøkjarin fær møguleika at virka í einum umhvørvi har náttúran hevur stóran leiklut.

**Vit ynskja**
at umsøkjarin:
- dámar væl at vera úti í náttúruni
- sær uppgávur sum avbjóðingar og ikki sum forðingar
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag við virðing fyri tí einstaka barninum

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett 6. august 2001. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meira fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Elsu Klein Olsen, leiðara, tlf. 31 83 71, ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Býlingshúsinum á Flat, Per Mohrs vegur 11, 188 Hoyvík, í hendi í seinasta lagi 30. juni 2001.

SNARSKIVAN




ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893

ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi

LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar

ADC

BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA


# Pedagogar

## til føroysk-teknmálstovuna á Dagstovninum á Argjum

Søkt verður eftir tveimum stuðulspedagogum til føroysk-teknmálstovuna á Dagstovninum á Argjum. Størvini eru á 30 og 35 tímar um vikuna.

Størvini verða sett 1. august 2001 ella eftir nærri avtalu.

Dagstovnurin á Argjum er ein sjálvognarstovnur. Á stovninum ganga 72 børn og samanlagt eru vit 18 starvsfólk. Á stovninum eru 2 vøggustovur og 4 barnagarðsstovur, har tann eina barnagarðsstovan er serstova, har vit samskipa deyv og tunghoyrd og hoyrandi børn. Á hvørjari stovu ganga 12 børn.

Tey, ið hava kunnleika til teknmál ogvitan um deyv og tunghoyrd hava fyrimun.

Vit ynskja, at tú saman við okkum skapar eitt umhvørvi fyri børnunum, har tey kunnu trívast og mennast. Somuleiðis, at tú ert nýhugsandi og hevur ábyrgdarkenslu. Harumframt ynskja vit, at tú ert virkin á stovninum við atliti at víðarmenning av hesum.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmálanum millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Ynskir tú at vita meira um starvið, kann tú seta teg í samband við Gudrun W. Rasmussen, leiðara á tlf. 319019.

Umsóknin skal sendast til Dagstovnin á Argjum í seinasta lagi 7. juli 2001.

**Dagstovnurin á Argjum**
Traðagøta 55 · 160 Argir
Tlf. 319019, 319004 · Fax 319015
e-mail: dstargir@post.olivant.fo

# MBF søkir dagligan leiðara

mbf

Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum (MBF) søkir dagligan leiðara at seta í starv 1. august 01.

**Vit bjóða:**
- fulltíðar starv, fyribils í eitt ár
- eitt áhugavert og fjølbroytt arbeiði
- gott og hugnaligt arbeiðsumhvørvi
- løn eftir nærri avtalu

**Vit vænta at tú:**
- hevur hollan kunnleika til umsitingarligt arbeiði
- hevur góð samstarvsevnir
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- dugir væl at samskifta á føroyskum, donskum og enskum
- hevur kunnleika til og áhuga fyri arbeiðinum innan brekaøkið
- er fryntlig/ur og hjálpsom/samur og vil hjálpa og vegleiða limafeløgini o.o.
- hevur góðan telduførleika

Umsóknin skal sendast til: MBF, Íslandsvegur 10c, 100 Tórshavn, **áðrenn 10. juli.**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til MBF-skrivstovuna, tlf. 317373 ella á e-mail: mbf@post.olivant.fo

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Skrivari

Á fyrisitingini hjá sjúkrahúsleiðsluni er fulltíðarstarv sum skrivari leyst at søkja til setan 1. august 2001 ella eftir avtalu.

**Arbeiðsuppgávur:**
- skrivarauppgávur fyri sjúkrahúsleiðsluna
- arbeiðsuppgávur fyri starvsfólkadeildina
- journalisering/arkivering
- tænastuuppgávur
- innkalling til fundir
- fyrireika fundir fyri leiðsluna
- føra fundarkalendarar
- skriva fundarfrágreiðingar
- reinskriva projektfrágreiðingar

**Førleikakrøv:**
- útbúgving sum skrivari, skrivstovuútbúgving ella líknandi
- royndir sum skrivari innan fyrisiting
- hollur førleiki í føroyskum og donskum
- verða før/ur fyri at ætlanargera og raðfesta sítt arbeiði
- tænastusinnað/ur
- evni at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni
- góður røkjuskapur
- góður førleiki í tekstviðgerð og rokniarki (Word/Excell)
- hava vilja til fakliga menning

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Óla Arge, starvsfólkaleiðara, telefon 31 35 40, lokal 267 ella á e-post olia@ahs.fo

**Umsóknarfreistin er:** 29. juni 2001, kl. 14.00.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

# Bilur við stórum skaða til sølu

**Merki:** BMW 318 TDS 1.8 Sedan
**Árg.:** 1995
**Km:** 193.290

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú, og kann síggjast í garðinum hjá tryggingarfelagnum á Smyrilsvegi í Havn.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Fróði Müller, sýnsmaður
Tlf. 345728
fax nr. 345607
e-mail: fm@trygging.fo
at hitta mánadag-hósdag millum kl. 8.00-10.00 og fríggjadag millum kl. 8.00-15.00